## VIÐMERKINGAR

# «Visión 2015«: Føroyingar mest dálkandi fólkaslag í heiminum

**Bogi Hansen**
*Velbastaður 15. august 2005*



Á Ólavsøku avdúkaði Løgmaður endiliga visiónirnar hjá Landsstýrinum, sum graml hevur verið um nú eina tíð. Har eru nógvar góðar visiónir og spennandi ætlanir; men eini visión hevur Landsstýrið slept: At taka meðábyrgd fyri at varðveita knøttin sum eitt gott stað fyri tí, sum á honum livir, og fyri komandi ættarliðum.

Sum flest øll munnu vita, eru Føroyar millum tey lond, sum útleiða mest av koldioxidi (koltvíiltu) í mun til fólkatalið. Koldioxid fer út í luftina, tá vit brenna olju í elframleiðslu, oljufýringum, bilum, skipum o.s.fr., og hetta ávirkar veðurlagið á havi og landi um allan knøttin. Tey seinastu 50 árini hevur hetta broytt veðurlagið á jørðini, og tað fer bara at versna ta komandi øldina. Ongin ivi er um, at hetta er tann álvarsligasta náttúrudálkingin í heimshøpi, og her liggja Føroyar altso ógvuliga nær einum fyrstaplássi.

Tí kundi tú kanska væntað, at Landsstýrið eisini hevði eina visión um, hvussu vit loysa tann trupulleikan; men so var ikki. Á Ólavsøku í fjør segði sami løgmaður m.a.: *»Samgongan er samd um, at umráðandi er at verja og varðveita umhvørvið, ikki bara fyri okkara egnu skyld, men eisini tí at tað er okkara skylda mótvegis okkara eftirkomarum og umheiminum.«* Og: *»Stavnhaldið má vera, at vit seta okkum sum mál at nýta altjóða krøv á umhvørvisøkinum. Eisini mugu vit tryggja okkara áhugamál á økjum, har altjóða sáttmálar verða gjørdir, og gera okkum greitt, at slíkir sáttmálar áleggja okkum skyldur, ið skulu haldast her á landi.«* Men nakað tílíkt slapp altso ikki við í »visiónina«.

Nú hava vit í áravís hoyrt skiftandi samgongur og skiftandi landsstýri siga nakað somu søgu: «Áðrenn vit binda okkum til nakran sáttmála, má málið kannast til botns«; men lítið hevur verið kannað. Føroyskir politikarar í øllum litum tykjast samdir um, at hetta málið er ov trupult, og best er at lata sum einki. So kanska Løgmaður helt tað vera ov pínligt einaferð aftrat at tosa uttanum. Kanska helt hann tað vera best at siga sum minst. Og í veruleikanum verður málið ivaleyst avgreitt av sær sjálvum uttan nakað roks. Tí Landsstýrið fer at orða ein yvirskipaðan orkupolitikk, segði Løgmaður, og orka í Føroyum kemur næstan øll frá olju. So tá tú hevur avgjørt orkupolitikkin, tá hevur tú eisini avgjørt dálkingarpolitikkin.

So kundi tú kanska vónað, at dálkingartrupulleikin var tikin við í orkupolitikkinum; men tann, sum hoyrdi landsstýrismannin í orkumálum umrøða hetta í Tinginum í vetur, man helst hava mist ta vónina. Hann hevði sæð eina sjónvarpssending, sum segði, at einki hald er í tosinum um veðurlagsbroytingar, og henni trúgva hann og Landsstýrið eftir øllum at døma meiri enn sakkunnleikanum.

Tú kundi eisini vónað, at onkur fór at hugsa um framtíðarbúskapin hjá okkum, nú talan hevur verið um at leggja ikki bara rækjuflotan, men eisini onnur skip, tí at oljan er dýrkað so nógv. Upp á langt sikt verður oljan bara dýrari, og lond, sum ikki tillaga samfelag og vinnulív til at krevja minni orku, verða taparar. Men orku- og umhvørvis- »guruin« hjá Landsstýrinum hevur mett, at oljuprísurin helst fer at halda sær undir 25 dollarum fyri tunnuna fram til 2020 (Lomborg, 2001 s. 122), so Landsstýrið vónar eftir øllum at døma, at trupulleikarnir ikki vísa seg, fyrr enn «visiónin« er av.

Og sjálvandi: Um endamálið við »visiónini« er, at Føroyar í 2015 skulu verða »fremst« á so nógvum økjum sum møguligt, so hevur Landsstýrið kanska valt ta lættastu loysnina. Tí, sjálvt um «visión 2015« hevur nógvar góðar ætlanir, sum kundu gjørt Føroyar millum framkomnastu lond, so verða tær flestu teirra torførar at seta í verk. Men hvat dálking viðvíkur, skuldi væl borið til. Vit liggja longu ógvuliga frammarlaga á dálkingarøkinum. Tað er bara at halda áfram á somu leið, so verða Føroyar óivað »fremsta« dálkingartjóð. Vit verða mest dálkandi land í mun til fólkatalið, kanska longu í 2015. Í seinna enda fáa vit helst eina dýra rokning; men vit munnu øll vóna saman við Landsstýrinum, at tað ikki verður tey fyrstu valskeiðini.

# Eitt fólk og ein fiskur = miðvís gransking?

**Mortan Hentze**

Nú er man politiskt farin at ætla at fremja miðvís framtøk fyri gransking Føroyum. Hetta er bæði gleðiligt og neyðugt. Granskingarkjakið hevur fevnt breitt og nógv góð orð eru søgd. Tað er tó ein stovnur, sum at kalla konsekvent ikki verður nevndur í hesum kjakinum. Kanska tí hesin stovnur ikki plagar at gera serliga nógvan háva burturúr sær sjálvum og kanska tí at partar av teimum, sum luttaka í granskingarkjakinum, halda at hann eigur ein sjálvsagdan leiklut í granskingarumhvørvinum. Tað eru uttan iva eisini tey, ið als ikki hava fingið eyguni upp fyri tí leikluti, ið hesin stovnur eigur hava í einum framkomnum samfelagi. Ikki minst í einum samfelag, ið sigur seg vilja fremja miðvís framtøk fyri gransking.

Stovnurin, sum konsekvent ikki verður nevndur, er Føroya Landsbókasavn. Í mínum heimi er tað ein altavgerandi fyritreyt, at man hevur eitt dagført og vælskipað bókasavnsverk, um ein vil fremja miðvísa gransking. Henda myndin gerst heilt greið, tá man hyggur at stovnum og londum, ið raðfesta gransking høgt. Eitt dømi um ein slíkan stovn er Fróðskaparsetrið á Harvard. Har hevur man ikki minni enn 90 bókasøvn og uml. 1200 fólk starvast á hesum bókasøvnunum - 800 av hesum eru útbúnir bókavørðir. Á Harvard eru o.u. 19.500 lesandi, tvs. uml. eitt bókasavnsfólk fyri 16. hvønn lesandi.

**Umstøðurnar til stuldur eru tíanverri ikki til staðar**

Hermann Oskarsson hevði eina grein í Dimmu nú ein dagin, sum hann kallaði "Granska ella herma - tað er spurningurin". Í greinini skrivar hann m.a.:

*"Kom og herm. Hugsa tær hesa støðuna:*

*Heimsins mest framkomnu lond við miljardavís av granskingarpengum og dyggum granskingarháskúlum og laboratorium venda hvørjari steinpirru í biokemi, elektrospektrometri, ílegutøkni og øðrum hugsandi og óhugsandi evnum. Teoretiska granskingin verður borin víðari inn í experimenterandi framleiðslur við fremstu tøkni og almennur stuðul latin til pionerframleiðslu, sum so endar í spildurnýggjari framleiðslutøkni, nýskaptum vørum og nógv øktari ferð í tænastuflutningi.*

*Hetta gera tey hvørt ár og úrslitið er upp í fleiri bókasøvn av uppskriftum, leiðbeiningum, ávaringum og góðum hugskotum, sum tað fer at kosta okkum fleiri ferðirnar 300 miljónir at uppfinna bara ein hyllametur av.*

*Hvat er tá meira náttúrligt hjá einari so ófantaliga lítlari og fámentari tjóð sum okkara við so lítlum kunnleika, enn at fara inn á bókasavnið - at lesa. At herma og stjala. At kopiera og eftirgera.*

*Hví skuldu vit gjørt annað?"*

Hermann hevur tann góða eginleika, at tá politisku hyenurnar fara í sjálvsving og samýla somu innantómu frasurnar upp í saman, skrivar hann eina grein ella tvær, so dýpd aftur kemur inn í tað, ið ýlt verður um. Tað ger hann eisini í omanfyrinevndu grein. Hugskotið hjá Hermanni um stuldur er gott, trupulleikin er bara tann, at vit í Føroyum ikki hava eitt einasta skikkað bókasavn at fara á, um vit vilja lesa, herma, stjala, kopiera og eftirgera. Føroya Landsbókasavn hevur ikki so frægt sum eina skikkaða lesistovu at bjóða erligum granskingartjóðum og Landsbókasavnið hevur so ólukksáligani langt frá teir fíggjarligu, menniskjaligu og tøkniligu karmarnar, sum eru neyðugir, um man vil fremja miðvísan "granskingarstuldur".

**Tankatoskurin**

Tað tykist sum politiski myndugleikin og tey, ið annars royna at kasta ljós á framtíðar gransking í Føroyum hugsa øgiliga ítøkiligar granskingartankar. Kjakið gevur mær hesa myndina - ein granskari, ein toskur og so ein starvsstova, júmen so eru allar fyritreytirnar fyri gransking til staðar. Hetta er allarhelst eisini rætt, men tað krevst eitt sindur meira, um vit í Føroyum ynskja at fremja miðvísa og dygdargóða gransking. Fyri ein stóran part av granskingini er tað altavgerandi, at man hevur atgongd til kostnaðarmiklar dátugrunnar og tilfar. Hesir dátugrunnar og hetta tilfarið eigur at verða umsitið av einum vælskipaðum bókasavnsverki, ið samstarvar í einum vælútbygdum netverki, við altjóða granskingarstovnar og granskingarbókasøvn. Hetta skuldi sagt seg sjálvt - skuldi verið almenn vitan, men eg eri farin at ivast í um so er. Tá eingin nevnir Landsbókasavnið við einum orði í granskingarhøpi og tá landsins myndugleikar so lystiliga kuta í játtanina hjá hesum stovni, sum nú í 177 ár er hildin á fosturstøði, eri eg farin at ivast í, um hetta er almenn vitan.

Heldur man veruliga, at man kann fremja miðvísa gransking í Føroyum uttan eitt sterkt og dagført bókasavnsverk? Eg haldi tað ikki! Kanska landsins myndugleikar og føroyska granskingarumhvørvið áttu at gjørt sær nakrar tankar um, hvønn leiklut Føroya Landsbókasavn eigur at hava í tí føroyska granskingarumhvørvinum, og ikki bara hugsað ítøkiligar tankar um granskarar, toskar og starvsstovur.

P.s. síggi at orðið bókasavn ikki verður nevnt í "Frágreiðing og tilmæli í samband við stovnsetan av granskarapark". Í frágreiðingini hevur man heldur valt at gera sær tankar um kvadratmetrastødd á m.a. klædna- og bæðihølum.

## Ziska til Klaksvíkar

Norðoya Bjargingarfelag hevur keypt ein serligan bjargingarbát úr Onglandi, og hesin báturin kemur til Klaksvíkar í sambandi við Sjómannadagin leygardagin.

Nýggi báturin, sum er serliga bygdur til bjarging, hevur fingið navnið Ziska, og hann er nú á veg til Føroya.

Klaksvíkar kommuna og aðrir stuðlar hava verið við til at fíggja keypið av nýggja bátunum, sum fær heimstað í Klaksvík og kann verða við í bjarging á innaru leiðunum.

*-ek*

## Granskaraparkin skal draga til sín

Arbeiðsbólkurin, sum hevur gjørt tilmæli um føroyska granskarapark, hevur eisini orðað visiónirnar fyri parkina, og her verður denturlagdur á ein miðsavnandi leiklut, sum kann draga vitan og kapital til sín.

Granskaraparkin skal fáa miðsavnandi leiklut í sambandi við kommersialisering av úrslitum innan nevndu fakøki og skal gera sítt til, at føroyskar fyritøkur og vørur og tænastur standa seg í altjóða kapping.

– Parkin verður markamót millum verandi vinnu, hægri nám, granskingarumhvørvi og íverksetarar, stuðlar vinnuligari menning, nýhugsan og nýskapan við at stimbra og menna sambond og samskifti millum íverksetarar, granskarar, serfrøðingar og vinnulív og sameinir og skapar synergi millum íverksetarar, almennar granskingarstovnar og vinnulívið, skrivar arbeiðsbólkurn.

Arbeiðsbólkurin heldur eisini, at granskaraparkin skal draga til sín føroyskar og útlendskar "know-how" fyritøkur, váðafúsan føroyskan og útlendskan kapital, føroyskar og útlendskar granskarar og onnur við fakligum førleika og útbúgving frá hægri lærustovnum og fáa samstarv í lag við granskingarumhvørvi kring allan heimin.

*-ek*